Vikuskiftis Sosialurin



## Forsetaval í Afghanistan

Afghanska valnevndin kunngjørdi í morgun, at forsetaval verður í landinum tann 20. august. Politiskir eygleiðarar vænta, at Hamid Karzai, forseti, fer at stilla uppaftur, sjálvt um umdømi hansara er versnað nógv í seinastuni orsakað av áhaldandi tíðindum um svik í almennu umsitingini og í tí politiska umhvørvinum og vantandi úrslitum í bardaganum við Taliban. Karzai er tann fyrsti leiðarin í Afghanistan, sum er valdur á demokratiskan hátt.



# Arbeiðsloysi eggjar

*Vónin er sjálvandi, at fólk reisa seg upp, rætta ryggin og siga "Nei, hetta finni eg meg ikki í!" Til dømis at konan, sum er send til hús, sigur við mannin: Tað kann væl vera, at eg eri arbeiðsleys, men eg eri ikki tín trælur fyri tað!*

*Modelmynd*



**Arbeiðsloysi kann verða eitt neyðugt gypp í afturpartin, ella tað kann smildra sjálvsvirðið hjá fólki. Hetta sigur Helgi Rasmussen, vinnusálarfrøðingur, sum í fleiri ár hevur hildið skeið fyri fólki, sum eru vorðin arbeiðsleys**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Tíverri. Vit hava ikki brúk fyri tær longur.

Nøkur hava longu fingið boðini.

Fleiri eru væntandi.

Eins og í restina av heiminum er kreppan nú av álvara farin at gera vart við seg, eisini her á landið.

Og hetta kostar.

Ikki bara á bankakontoini, men eisini á sálarkontoini hjá teimum, sum verða ofr-að á arbeiðsmarknaðinum.

Nú gongur neyvan dagur, har vit ikki hoyra um virkir, sum lata aftur, almennir stovnar, sum spara, og privatar fyritøkur, sum skera feittið frá.

Men hvørji rúka? Og hvørjar avleiðingar hevur tað, bæði á tann einstaka og á samfelagið, at fólk, sum hava arbeitt við fullari megi í fleiri ár, nú knappliga verða send heim í sofuna til Dr. Phil?

- Fólk, sum verða uppsøgd kenna seg vrakað. Men tað er lættari at koma upp undan, um tú vart ein av hundrað, sum vórðu sent heim, tí virkið lat aftur, enn um tú vart ein av teimum fáu, sum leiðslan metti seg kunna liva uttan.

Orðini eigur Helgi Rasmussen, vinnusálarfrøðingur (erhvervspsykolog), sum í nógv ár hevur hildið skeið hjá Als, fyri fólki, sum eru vorðin arbeiðsleys

### Rakar breitt

Hann greiðir frá, at í sambandi við arbeiðsloysi eru fleiri faktorar, ein eigur at hyggja at. Arbeiðsloysi rakar bæði samfelagið, sum heild, og einstaklingin. Sostatt ber til at viðgera tað við sosial-psykologiskum brillum, har hugt verður eftir sálarheilsustøðuni í samfelagnum. Ella við støði í einstaka menniskjanum, sum missir arbeiðið.

- Tað eru bæði fyrimunir og vansar við arbeiðsloysi. Fyri samfelagið er tað ósunt við ov nógvum arbeiðsloysi og við null-arbeiðsloysi, sum vit hava upplivað seinastu árini. Og hjá tí einstaka kann arbeiðsloysi lata upp nýggjar dyr, ella tað kann oyðileggja fólk fullkomiliga, sigur Helgi Rasmussen.

### Kann skapa samanhald

Sum sagt, er nokkso stórur munur á, um fólk eru offur fyri hópuppsøgnum, til dømis tí eitt virki fer á heysin, og so tað, at verða vald út millum øll hini.

- Tað er altíð lættari at hava tað ringt, um øll hini eisini hava tað ringt, eitt nú í krepputíðum. Í sambandi við hópuppsagnir eru tað tí